

*Tað var Katrin H. Petersen, sum las upp og handaði býráðsformanninum, Rodmundi Nielsen, skrivið.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Sjáldan áður munnu so mong ungfólk hava verið á býráðsskrivstovuni í Saltangará í senn*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

140 skúlanæmingar mótmæltu:

# Innrás á býráðsskrivstovu

**- Vit hava fýra skúlar í Runavíkar kommunu, men í framtíðini er ætlanin, at vit bert skulu hava tveir. Nýggjur skúli verður væntandi bygdur í Runavík, samstundis sum skúlarnir í Rytuvík og Søldarfirði verða niðurlagdir. Men slíkar útbyggingar og broytingar á skúlaøkinum henda ikki frá degi til dags, sigur Hans Petur Ellingsgaard**

MÓTMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stundisliga fríggjamorgunin klokkan 10 møttu einir 140 næmingar úr framhaldsskúlanum í Runavík upp á býráðsskrivstovuni í Saltangará at gera vart við og mótmæla, at einki fríøki er uttan um skúlan í Runavík.

Hósdagin, 1. apríl, boðaðu næmingarnir býráðsformanninum, Rodmundi Nielsen, frá, at teir komu fram við fríggjamorgunin at handa hetta skrivið, sum einir 140 næmingar hava skrivað undir.

Býráðssalurin var á tremur og sitipláss var bert til ein part av ungu fjøldini.

Næmingarnir høvdu eisini teknað sær nøkur skelti, sum settu sín dám á tiltakið.

Tað vóru býráðsformaðurin, Rodmundur Nielsen og formaðurin í mentanarnevndini, Hans Petur Ellingsgaard, sum tóku ímóti næmingunum.

Katrin H. Petersen, sum gongur í 8. flokki í Runavíkar skúla, las skrivið upp, áðrenn hon handaði býráðsformanninum tað.

– Vit vilja gera vart við og mótmæla, at einki fríøki er um skúlan. Vit halda, at eitt fríøki hevði gagnað næmingunum, bæði til likams og sálar – og hetta hevði sjálvandi eisini gagnað undirvísingini.

Í skrivinum vísa næmingarnir á, at sum er, er einki at gera í fríkorterinum.

– Tí finna næmingarnir uppá ymiskt "stuttligt", eitt nú at roykja, spýta inni, keypa, skriva á veggirnar og annars oyðileggja teir fáu møblarnar, vit hava.

Næmingarnir siga seg vóna, at skrivið verður móttikið í sama góða anda, sum tað er skrivað

– Men vit halda ikki, tað er í lagi, at einki fríøki er um skúlan.

Rodmundur Nielsen, sum frammanundan hevði boðið øllum næmingunum vælkomnum á gátt, takkaði fyri skrivið og ásannaði, at umstøðurnar við Runavíkar skúla ikki eru nøktandi.

Hann segði, at býráðið tekur ímóti brævinum og fer at viðgera tað við virðing. Hann lovaði eisini, at tá ið næmingarnir nú eru komnir við einum brævi, skulu teir eisini fáa eitt svar.

– Fægstu av tykkum hava verið her inni áður, og tit eru altíð vælkomin at tosa við okkum.

Býráðsformaðurin segði, at tað tekur tíð at fremja tær stóru broytingarnar, men hann luftaði samstundis tankan um, at kommunan kanska fer at finna út av eini loysn, sum kann bøta um viðurskiftini, áðrenn ein endalig loysn verður framd á skúlaøkinum.

Formaðurin í mentanarnevndini greiddi síðan frá, hvørjar framtíðarætlanir, kommunan hevur á skúlaøkinum.

Hans Petur Ellingsgaard vísti eina tekning sum lýsir, hvussu skúla-og mentanarøkið í Runavík ætlandi kemur at síggja út í framtíðini.

– Sum er, hava vit fýra skúlar í kommununi, men í framtíðini er ætlanin, at vit bert skulu hava tveir. Nýggjur skúli verður væntandi bygdur í Runavík, samstundis sum skúlarnir í Rytuvík og Søldarfirði verða niðurlagdir.

Men, legði hann aftrat:

– Slíkar útbyggingar og broytingar á skúlaøkinum henda ikki frá degi til dags, segði Hans Petur Ellingsgaard.

Tá ið løtan var umliðin, fóru næmingarnir líka so stillisliga avstað aftur, sum teir vóru komnir.



*Hans Petur Ellingsgaard, formaður í mentanarnevndini, greiddi frá framtíðarætlanum á skúlaøkinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Kappin liggur svínabundin

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið manningin á rækjutrolaranum, Kappanum, kom aftur av Svalbardsleiðini herfyri, fingu teir at vita, at teir vóru uppsagdir, tí skiparaksturin gongur ikki.

Sambært stjóranum á Rækjuvirkinum, Hans Jóhannes á Brúgv, hevur fiskiskapurin hjá Kappanum verið nøktandi, men prísurin á rækjunum eru so lágur, at skiparaksturin hongur ikki saman.

Sum skilst, fara í løtuni samráðingar fram við fíggingarstovnar um, hvussu berast skal at fyri, at Kappin kann loysa aftur.

Tað er ikki eitt ár liðið, síðan O.C. Joensen á Oyri keypti Kappan fyri einar 20 miljónir. Skipið er bygt í 1971 og er nútímansgjørt fyri væl av peningi.

Í løtuni liggur skipið svínabundið norðuri á Oyri.



*Kappin er fyribils lagdur, og manningin er uppsøgd*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



»SJOKK PRÍSIR«

Hjálpi okkum at tøma lagrið · Leygardagin kanst tú gera kvettið

Klædningar nú kr. 500,-
Jakkar einans kr. 300,-
Buksur kr. 100,- og 200,-
o.m.a. fyri botnprísir

Leygardagin er opið til kl. 17.00
JUNGMANN í Saltangará
Klæðir til mannin, eisini tann tilkomna!
TEL 44 81 10

SUÐUROYAR SPARIKASSI

## Ársaðalfundur Suðuroyar Sparikassa

*Verður mánadagin 19. apríl 2004 kl. 18.00 á Hotel Bakkanum við hesi dagsskrá:*

1. *Val av fundarstjóra*
2. *Frágreiðing umsjónarráðsins um virki Sparikassans í farna ári*
3. *Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar, og støðutakan til nýtslu av ársúrsliti*
4. *Val av limum í umsjónarráðið*
5. *Val av grannskoðarum*
6. *Uppskot frá stjórn, umsjónarráði ella umboðsráðslimum*
7. *Ymiskt*

*Umsjónarráðið*

REPROZ



## Sethús í Norðragøtu til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða hesi húsini í Norðragøtu seld.

Stødd: 3 hæddir á 52 m²
Loft: 4 kømur
Miðhædd: Gongd, wc/bað, køkur og stova
Kjallari: Kamar, stova og køkur í einum

Húsini, sum eru bygd í 1964, eru í góðum standi. Tak v/ tróðri, klædningur og vindeygu eru nýggj. Allar hurðar í húsinum eru nýggjar. Garður við parkeringsøki er niðan fyri húsini. Kjallarin er innrættaður í 2002.
Húsini standa í friðarligum umhvørvi og hava gott útsýni.

**Ring og hoyr nærri á tlf. 442169 eftir kl. 10.00 mánadagin tann 5. apríl 2004.**



## Fíggjarleiðari/ bókhaldari

**Søkt verður eftir fíggjarleiðara/bókhaldara til at byrja skjótast gjørligt.**

Starvið umfatar alt fyrisitingarligt arbeiði innan fíggjarstýring, bókhald og annað vanligt skrivstovuarbeiði.

Viðkomandi skal hava útbúgving og royndir innan fíggjarstýring og bókhald, skal hava góðan teldukunnleika og góð samstarvsevni.

Løn sambært avtalu.

Umsókn við prógvum og upplýsingum um royndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. apríl 2004 og skulu stílast til:

demich
**P/f Demich**
Stiðjagøta 2 · Postboks 378
FO-100 Tórshavn

## Sálarfrøðingur

- havi latið upp viðgerðarstovu
- arbeiði innan sjúkrakassasáttmála um endurgjald við ávísing frá lækna
- eri at hitta gerandisdagar millum kl. 08-09 á tlf. **31 03 35**

**Kári Leivsson**
**autoriseraður kliniskur sálarfrøðingur**
Hoyvíksvegur 65
boks 3134 · 110 Tórshavn

Visti tú ikki tað? Sosialurin